## 5 tey bestu ferðalondini

*Vit hava biðið Mariu Samson Lamhauge, sum starvast hjá Flogfelag Føroya, valt fimm tey bestu londini at ferðast til.*



# Thailand – ein heimur av oyggjum

Thailand er perlan í eystri. Strendurnar eru ævintýrliga vakrar, regnskógurin hugtakandi, og fólk eru sera fyrikomandi og blíð – eitt smíl er ongantíð langt burturi. Mentanin í Thailandi er nakað fyri seg, og sum ferðandi mást tú ikki gloyma at vitja í einum av teimum mongu templunum í landinum.

Thailand er helst tað landið í heiminum, sum kann bjóða flest vakrar og eksotiskar oyggjar. Flestu av oyggjunum liggj sunnanfyri, og nakrar fáar av teimum liggja í Andamanhavinum.

Thailand hevur í nógv ár verið eitt væl umtókt ferðamál hjá europearum, og tað er als ikki so løgið. Landið gevur tær ein uppliving fyri lívið.






















